Ítróttar
# Sosialurin
Nr. 111 • týsdagur • 13. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fyrstu gullmerkini gjøgnum nýggju høvuðsdyrnar




*Talan var um øgiligan endaspurt, sum vissaði Klaksvíkinginum gullið. Ein sigur, sum klaksvíkingar eisini skuldu læra at hátíðarhalda*
*Mynd: Álvur*

**Hugflognum bilti einki, tá ið klaksvíkingar leygarkvøldið royndu nýtt ritual at halda seg til, tá ið teir koma aftur av sigursferðum í ítrótti**

SØGULIGUR SIGUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Á hesum síðum varð tað, sum tað so mangan hevur verið gjørt áður, staðfest undan Norðoyastevnuni, at 10-mannafarið í Klaksvík hevur ikki vunnið, síðani teir í 1970 vunnu tríggjar róðrar.

Leygardagin varð langa oyðimarkargongdin hjá 10-mannafarinum í Klaksvík av. Tað plagar at verða tikið til í Klaksvík, at tá ið tað ikki gongur so væl hjá KÍ, so gongur tað betri í øðrum ítróttargreinum, sum teir har norðuri luttaka í. Hetta kundi í hvussu so er sigast um síðsta vikuskifti. Klaksvíkingur fekk sjey stig í einum FM kappróðri. Tað hevur hann ongantíð fingið áður, tí tað var ikki fyrrenn í 1973, at stigaskipanin, sum hevur verið galdandi síðani, varð roynd fyri fyrstu ferð.

Sigurin hjá Klaksvíkingi í Kollafirði var fyrsti stóri ítróttarsigurin hjá klaksvíkingum, síðani fasta sambandið undir Leirvíksfjørði gjørdist veruleiki. Tað hava verið fastar traditiónir, hvussu ítróttarfólk hava verið móttikin, tá ið tey eru komin aftur til Klaksvíkar. Ternan og Dúgvan plagdu at toga í floytuna fyri at boða frá, at nú vóru sigursharrarnir á veg inn á Vánna, og so hevur verið svarað aftur á landi við fýrverkarí og við at nógv hava møtt upp á ferjuleguni á Stongum.

Nú er hetta søga, og tað sást aftur leygarkvøldið. Trailararnir við kappróðrarbátunum komu undan á Borðoyavík um átta tíðina. Spurningurin var so, hvussu tað skuldi markerast, at fyrsti sigurin í kappingini millum 10-mannaførini í 36 ár var vorðin veruleiki.

Svein Rógvi Nielsen, bátsformaður á Klaksvíkingi, greiðir soleiðis frá:

– Vit koyrdu runt í býnum og boðaðu við floytuni frá, at nú vóru vit afturkomnir.

Báturin varð tikin úr bilinum norðanfyri skýlið við fótbóltsvøllin, og so varð hann trillaður á vágni oman í neystið. Tá varð nakað av fólki komið saman, og so varð fýrverkarí skotið frá neystinum av.

At hetta tóktist rigga væl ber ivaleyst við sær, at soleiðis fer at verða borið at, tá ið vinnarar fara at koma til Klaksvíkar gjøgnum nýggju høvuðsdyrnar til Klaksvíkar, ið eru har, sum bakdyrnar vóru inntil fyri knøppum tveimum mánaðum síðani.

Um tað yvirhøvur verður høvi til nakra stórfingna móttøku afturat í ár fæst fyrsta staðfestingin av leygardagin, tá ið triði FM kappróðurin verður á Skálafjørðinum.

**FM-kappróður**

| 5-mannafør, dreingir | Stig | Sundalagsstevna |
|---|---|---|
| 1 Jallur | 12 | 5 |
| 2 Ritan | 11 | 7 |
| 3 Kollur | 9 | 4 |
| 4 Havfrúgvin | 6 | 3 |
| 5 Sílið | 3 | 1 |
| 6 Strípan | 2 | 2 |
| 7 Blikur | 1 | 0 |
| **6-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 Lómur | 12 | 7 |
| 2 Riddarin | 12 | 5 |
| 3 Smyril | 8 | 4 |
| 4 Jarnbardur | 6 | 3 |
| 5 Hvessingur | 4 | 2 |
| **5-mannafør, gentur** | | |
| 1 Frúgvin | 12 | 7 |
| 2 Blikur | 10 | 3 |
| 3 Drekin | 8 | 4 |
| 4 Havfrúgvin | 7 | 5 |
| 5 Dúgvan | 3 | 0 |
| 6 Hvassi | 2 | 2 |
| 7 Ørnin | 2 | 1 |
| **5-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 Ørnin | 14 | 7 |
| 2 Sílið | 10 | 5 |
| 3 Jallur | 7 | 4 |
| 4 Ritan | 6 | 2 |
| 5 Junkarin | 5 | 3 |
| 6 Drekin | 2 | 1 |
| **6-mannafør, menn** | | |
| 1 Sølmundur | 14 | 7 |
| 2 Sundabáturin | 10 | 5 |
| 3 Jarnbardur | 8 | 4 |
| 4 Smyril | 5 | 2 |
| 5 Gongurólvur | 4 | 3 |
| 6 Hósvíkingur | 3 | 1 |
| **8-mannafør** | | |
| 1 Knørrur | 14 | 7 |
| 2 Ørvur | 10 | 5 |
| 3 Argjabáturin | 8 | 4 |
| 4 Nevið Reyða | 6 | 3 |
| **10-mannafør** | | |
| 1 Klaksvíkingur | 12 | 7 |
| 2 Eysturoyingur | 12 | 5 |
| 3 Havnarbáturin | 8 | 4 |
| 4 Skálabáturin | 6 | 3 |
| 5 Vestmenningur | 4 | 2 |
| 6 Nólsoyingurin | 2 | 1 |

# Kappsiglingin byrja

**Fyrsta kappsiglingin fyri 4- og 5-mannafør var á Sundalagsstevnuni**

KAPPSIGLING

*Tíðindaskriv*



*Veðrið var av tí allarfagrasta, tá farið varð undir fyrstu kappsiglingina í ár*

Bátarnir møttu í bátahylinum við húsið hjá Bátafelaginum kl. 14, og fingu har frágreiðing um siglingarleiðina, startin, og hvar boyurnar lógu, sum vendast skuldi um, fingu luttakaralista og nummur.

Tilsamans 14 bátar vóru á startlistanum.

Tann báturin, sum lá fremstur alla siglingina, Hoyvíkingur, var so óheppin at bróta stýrið, tá ið teir vendu um seinastu boyuna. Teir máttu brúka ár og vórðu tí diskvalifiseraðir.

Bátur, sum kom annar um mállinjuna, Gjáarbáturin, gjørdist sostatt vinnari. Nummar 2 gjørdist Malli. Men tann báturin, sum var nummar 3 hevði ov stórt segl og varð tí somuleiðis diskvalifiseraður, og í hansara stað kom so bátur nr 5, Niels í Nesinum at verða triðjur. Eitt sindur av dramatikki er altíð, tá ið kappsiglt verður.

Næsta kappsigling verður á Eystanstevnu í Runavík sunnudagin 18. juni og triðja á Hvítanesi/Kaldbak sunnudagin 9. juli.

Seinasta kappsiglingin verður væntandi um miðjan august, tá ið Lions skipar fyri.

Til allar Kappsiglingarnar verða stig givin, soleiðis at 10 teir fremstu bátarnir fáa stig: nr.1 fær 10 stig, nr.2 fær 9 stig ... nr.10 fær 1 stig. Tá árið er av, verður føroyameistari funnin.

Fyri at gera kappsiglingina enn betur verður heimilað dómarunum at diskvalifisera bát, um hann ikki yvirheldur reglurnar.